# Ongin skattur av SU

Aljóða Skrivstovan sigur, at føroyingar, sum lesa í Stóra Bretlandi sleppa undan at rinda skatt av lestrarstuðuli. Seinasta árið hevur verið eitt sindur av iva um føroyingar, við fullari skattskyldu og bústaði í Føroyum, hava rætt til at sleppa undan at rinda skatt av SU, tá ið teir lesa í Stóra Bretlandi. Men nú er tað greitt, at teir skulu ikki rinda skatt av SU, tí í Føroyum er lestrarstuðul skattafríur! Tey, sum lesa ella fara at lesa í Stóra Bretlandi, kunnu fáa váttan frá TAKS um at tey hava varðveitt fulla skattskyldu í Føroyum og hava bústað í Føroyum. Í Føroyum er lestrarstuðul skattafríur.



# Nýggj føroysk fiskivinnusøga

**Fyri fyrstu ferð eru upplýsingar um føroysku fiskivinnuna tey seinastu 50 árini savnaðar á einum staði**

BÓKAÚTGÁVA
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Tey, sum hava áhuga fyri føroyskari fiskivinnu, hava leingi havt tann trupulleika, at tað hevur verið sera trupult at fáa upplýsingar um vinnuna tey seinastu 50 árini. Úrslitið hevur verið, at lívssøgur hjá reiðarum, bøkur um slupptíðina og aðrar útgávur hava verið álitið.

Nú hevur forlagið Sprotin givið út bókina Nøgdir og nýbrot, sum Dennis Holm og Bogi Mortensen hava skrivað, og sum er ein søgulig gjøgnumgongd av føroyskari fiskivinnu síðani fimmtiárini. Sum part av virkseminum á Granskingardeplinum fyri Samfelagsmenning arbeiddu teir báðir høvundarnir í 2005 og 2006 við fleiri verkætlanum, sum høvdu við fiskivinnuna at gera umframt einari ES-verkætlan, sum millum annað snúði seg um at lýsa vandamál í føroysku fiskivinnuni.

Í hesum arbeiði komu teir báðir eftir, at hóast føroyingar eru ein fiskivinnutjóð, so er lítið og einki savnað tilfar um fiskivinnuna ta seinastu hálvu øldina. Teir settu sær tí fyri at savna tað viðkomandi tilfarið í bók, sum er ætlað at økja kunnleikan til føroyska fiskivinnu og broytingarnar, sum henni hevur verið fyri tey seinastu umleið hálvthundrað árini.

### Til frálæru

Dennis Holm sigur, at teir hava lagt seg eftir at skriva bókina á einum lættlesiligum máli, soleiðis at øll kunnu fáa nakað burturúr. Men eitt endamál er eisini at fáa skúlar at brúka bókina í frálæruni, tí sum er hevur skúlin at kalla einki frálærutilfar um føroyska fiskivinnu. Høvundarnir hava tí latið lærarar í samfelagsfrøði síggja bókina, og móttøkan hevur verið góð.



*Bogi Mortensen og Dennis Holm hava skrivað áhugaverda bók um gongdina í føroysku fiskivinnuni tey seinastu fimmti árini*
*Mynd: Álvur Hareldsen*

- Teir halda, at bókin er væl egnað sum frálærutilfar tað seinasta árið í fólkaskúlanum og tað fyrsta árið í miðnámsskúlanum, sigur Dennis Holm.

Herumframt vóna teiur báðir høvundarnir, at bókin kann vera eitt íkast til tað samfelagsliga kjakið um føroysk fiskivinnumál. Tað verður hon ivaleyst eisini, tí tá høvundarnir løgdu bókina fram í Miðlahúsinum fyrrapartin í dag, varð lívligtorðaskifti um fiskivinnupolitikk og fiskivinnu sum heild.

# Sandoyggin fær fast samband

**SEV leggur í dag nýggjan kaðal tvørtur um Skopunarfjørð**

ELVEITING
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*



*Nú Plejel hevur verið í Føroyum, hevur skipið eisini lagt kaðal millum Eiði og Haldarsvík*
*Mynd: SEV*

Síðani í februar í fjør hevur Sandoyggin fingið elmegi frá motorverkinum, sum SEV hevur í Skopun, men nú fær oyggin aftur elorku innan av meginøkinum.

Í morgun fór svenska kaðalskipið Plejel undir at leggja nýggjan elkaðal um Skopunarfjørð. Byrjað varð sandoyarmegin, har kaðalin fer í sjógv nakað sunnan fyri Skopunar bygd. Síðani fer kaðalin í ein boga eystur-á og snarar so aftur vesturá og kemur upp á land norðan fyri bygdina í Kirkjubø.

Í sambandi við arbeiðið at leggja nýggja kaðalin hava SEV og Landsverk kannað viðurskiftini á botni. Størsta dýpið, sum kaðalin liggur á, er 80 metrar. Nýggi kaðalin er tann fjórði í røðini. Tann seinasti helt í 25 ár, men fór í februar í fjør.

Nýggi kaðalin er smáar niggju kilometrar langur og 11,6 centimetrar í tvørmát. Hvør metur vigar góð 41 kilo, so kaðalin vigar góð 400 tons. Sjálvur kaðalin kostar 19 milliónir krónur, og við útlegging og øðrum útreiðslum kostar tað SEV 23 milliónir krónur at skifta kaðalin, sigur Finn Jacobsen, tekniskur stjóri hjá SEV.

### Loyst aðrar uppgávur

Nú Plejel hevur verið í Føroyum, hevur skipið loyst ymsar uppgávur fyri SEV. Eitt nú hevur skipið tikið tað gamla spennið um Leirvíksfjørð upp, og partar av tí gamla kaðalinum um Skopunarfjørð eru lagdir út tvørtur um Trongisvágsfjørð og millum Eiði og Haldarsvík.

Tað, sum ikki kundi brúkast aftur av sandoyarkaðalinum, er skorið sundur og pakkað í bingjur og verður sent kaðalvirkinum NKT í Danmark. Gamla spennið um Leirvíksfjørð fer sama veg.